## TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

***Móttøka***

*Tann 1. juli 2000 eru 60 ár liðin, síðan Samtakið Tryggingarsambandið Føroyar byrjaði virkið sítt. Feløgini í Samtakinum vórðu løgd saman frá 1. januar 1998 at rokna við navninum Tryggingarfelagið Føroyar.*

*Samstundis verður ættarliðsskifti í stjórnini. Forstjórin Jens Peter Arge fer frá, og Gunnar í Liða tekur við sum forstjóri.*

*Í hesum sambandi verður bjóðað til almenna móttøku á høvuðsskrivstovuni á Kongabrúnni fríggjadagin tann 30. juni 2000 frá kl. 15 til 18.*

*Øll eru hjartaliga vælkomin*

*Tryggingarfelagið Føroyar*

Saltangará · Tel 44 81 90
Klaksvík · Tel 45 61 90
Miðvágur · Tel 33 30 90
Tvøroyri · Tel 37 21 90
Vágur · Tel 37 38 90

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Kongabrúgvin
P.O.Box 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345600
Fax +298 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo



## Arbeiðsformaður

**Søkt verður eftir arbeiðsformanni til kloakk- og vegdeildina hjá Tórshavnar kommunu at byrja skjótast gjørligt.**

**Arbeiðið**
Arbeiðsformaðurin kemur, undir leiðslu av teknisku deild, at standa fyri ymiskum veg- og kloakkarbeiðum hjá Tórshavnar kommunu. Arbeiðsformaðurin skal leiða og samskipa arbeiðið á arbeiðsplássinum saman við verkfrøðingum á teknisku fyrisitingini. Harumframt kemur arbeiðsformaðurin at luttaka á relevantum fundum á teknisku fyrisitingini.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava relevanta útbúgving umframt koyrikort. Neyðugt er at viðkomandi, ið verður settur, kann arbeiða sjálvstøðugt og er førur fyri at taka skjótar og rættar avgerðir. Umsøkjari við kunnleika til veg- og kloakkarbeiði hevur fyrimun. Ynskiligt er at viðkomandi hevur kunnleika til dáta, so sum tekstviðgerð og rokniark.

**Lønarviðurskifti**
Starvið, ið verður sett skjótast tilber, er fulltíðarstarv og verður lønt eftir avtalu.

**Meir fæst at vita**
við at seta seg í samband við J. Sofus Hansen á teknisku deild ella Boða Haraldson, býarverkfrøðing, á tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 7. juli 2000. Viðmerk á umsóknina "Arbeiðsformaður".

Tórshavnar kommuna

WWW.TORSHAVN.FO









## VALUTAKURSIR

| | | 23.06.00 | Ultimo mai |
|---|---|---|---|
| USA | Dollarar | 794,9500 | 800,0200 |
| Bretland | Pund | 1194,1400 | 1197,6600 |
| Týskland | Markur | 381,2900 | 381,5600 |
| Svøríki | Króna | 90,1100 | 89,1600 |
| Noreg | Króna | 91,1900 | 89,6700 |
| Frakland | Frankur | 113,6900 | 113,7700 |
| Belgia | Frankur | 18,4800 | 18,1990 |
| Sveits | Frankur | 481,5000 | 474,9300 |
| Holland | Gyllin | 338,4000 | 338,6400 |
| Italia | Liri | 0,3851 | 0,3854 |
| Finnland | Markur | 125,4200 | 125,5100 |
| Ísland | Króna | 10,2100 | 10,5400 |
| Eysturríki | Skillingur | 54,1950 | 54,2230 |
| Spania | Pesetas | 4,4820 | 4,4850 |
| Portugal | Escudos | 3,7200 | 3,7220 |
| Kanada | Dollari | 538,2800 | 532,0900 |
| Grikkaland | Drakmur | 2,2160 | 2,2160 |
| Japan | Yen | 7,6205 | 7,4522 |
| Írland | Pund | 946,8900 | 947,4200 |
| | Evra | 745,7400 | 746,2600 |

FØROYA SPARIKASSI

## Norðurlendskur skúlafundur

Almennur skúlafundur, har norðurlendskir móðurmálslærarar taka lut, verður í auluni í Tórshavnar Kommunuskúla hósdagin 29. juni kl. 14. Evnið á fundinum er:

**Tað norðurlendska í skúlanum – hvagar gongur leiðin?**

Fundurin er fyri øll áhugað.

**Móðurmálslærarafelagið**
**Føroya Lærarafelag**


## Solar Føroyar

Starvsfólk søkist at byrja skjótast. Starvið umfatar sølu av el-lutum. Tað er neyðugt at hava útbúgving sum elektrikari. Kunnleiki innan handil er eisini ein fyrimunur.

Fyrispurningar og umsókn verða at senda til

**Solar Føroyar**
Postboks 105 · Brekkutún 2
110 Tórshavn · Tlf. 317933


# 2 ´arin

Leygardagur 24. juni 2000

## Kirkjan og internetið



Prestur heldur tørvur er á eini kirkjuligari tænastu á internetinum, men bæði prestur og bispur halda, at sálarrøkt skal ikki fara fram umvegis netið

s. 17

# Kongar og drotningar



Mynd: Jens K. Vang

»Tá ið tann indiski vísmaðurin Vivekananda stutt fyri fyrra aldarskiftið kom til Amerika, undraðist hann á ta hierarkisku kristnu gudsmyndina, við einum drotti ovast og undir honum eyðmjúkum tegnum. — Minnist til, at tit eru leyvur, ikki lomb, plagdi hann at siga.

Ein boðskap av sama slag finna vit í skaldskapinum hjá tí yrkjara, sum yrkti vígsluørindini til Sjónleikarhúsið, og sum búsettist í húsunum hjá Haraldi á Trappuni.

Tann lítli drongurin siglir út í heimin, biður upp bønarorð, fær kongsins dóttur og verður kongur í Bábylon. Gloymið ongantíð hetta. Havið tað við tykkum sum tannfæ, hvar ið tit fara. Á ein hátt eru tit øll kongar og drotningar í Bábylon.«

Hetta segði Hanus Kamban millum annað í pisurøðuni í Viðalundini í Havn mikudagin. Lesið alla røðuna á s. 20&21